Ílegugransking:

## Stórur áhugi at granska í føroyskum ílegum

**- Nú ræður um hjá okkum at tryggja okkum lut í tí granskingararbeiði, sum skal fara fram, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum**



*- Tað er sera umráðandi, at vit tryggja okkum lut í tí granskingararbeiði, sum nú skal fara fram í føroyskum ílegum, sigur Jan Mortensen*

ÍLEGUGRANSKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Samtakið, Bitland við stjóranum, Ólavi Gregersen, er nú í holt við at kanna, um útlendskar fyritøkur hava áhuga í at granska í føroyskum ílegum ella genum.

Hetta er ein kanning, sum Bitland ger fyri landsstýrið, nú arbeitt verður við at skipa eitt lógargrundarlag á økinum um hesa ætlaðu gransking í Føroyum.

### Stórur áhugi

Eitt fyribils úrslit hjá Bitland vísir, at áhugin millum útlendskar heilivágsfyritøkur fyri gransking í føroyskum ílegum er rættiliga stórur.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, sum hevur verið við í arbeiðnum at kanna áhugan hjá útlendskum fyritøkum, heldur, at nú ræður um hjá føroyingum at tryggja sær, at vit sleppa upp í part í hesum granskingararbeiði.

- Tað er sera umráðandi, at vit tryggja okkum lut í tí granskingararbeiði, ið nú skal fara fram, sigur Jan Mortensen.

Ílegugranskingin:

# Mennir granskingarumhv



**- Ílegusavnið verður ein stovnur í heilsuverkinum, sum skal savna saman og umsita tær tríggjar skráirnar, sum verða í skipanini. Stovnurin skal eisini móti gjaldi gera sáttmálar við granskarar og granskingarfyritøkur um gransking í upplýsingum í skráunum, sigur Pál Weihe, granskari**

ÍLEGUGRANSKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á fundi í Almanna-og Heilsumálaráðnum, 24. februar, legði Pál Weihe, granskari, fram uppskotið til lóg um ílegugransking - ella uppskotið til gransking av mannaílegum.

Tá ið hetta er eitt mál, sum mett verður at fara at geva inntøkur til føroyska samfelagið, hava vit valt at taka tað upp á vinnusíð-unum í dag. Ikki endiliga so nógv við vinnuliga sjónarmiðnum fyri eygað, men bygt á ta framløgu, sum Pál Weihe hevði fyri politikarum og embætisfólki í Almanna- og Heilsumálaráðnum herfyri.

Ein partur av hesi framløgu nertir eisini við vinnuligu sjónarmiðini - og útlendska áhugan - í spurninginum um gransking av mannaílegum í Føroyum.

### Fjøltáttar vinnulívið

Í fyrsta lagi hevði Pál Weihe eina lýsing av hugtakinum, sum rópt verður ílegugransking.

Hann segði, at her er talan um kanning av kotum á arvastronginum, sum liggja til grunds fyri mannalikaminum og sum verða yvirførd til eftirfylgjandi ættarlið.

- Arvastrongurin hevur umleið tríggjar miljardir basur og talið av genum ella ílegum er umleið 30.000-40.000.

Hann vísti á, at ílegukanningar kunnu finna sjúkuelvandi ílegur ella genir, sum tað eisini verður rópt; tær kunnu menna sjúkustaðfestingarhættir, menna sjúkuviðgerðarhættir - og at enda kunnu kanningar av mannaílegum fyribyrgja sjúku.

Um vinnuligu atlitini, segði granskarin, at lógaruppskotið slóðar fyri eini menning av granskingarumhvørvinum og verður við til at fjøltátta vinnulívið.

### Føroyar væl egnaðar

Pál Weihe vísti á, at ættarfrøðiligi hátturin at finna fram til ílegur, byggir á haldgóðar upplýsingar um eitt nú diagnosur, og í hesum sambandi vísti hann á, at vit í Føroyum hava álítandi ættartalvur.

- Í Føroyum liva og hava umleið 100.000 fólk livað síðan ár 1800, legði hann aftrat.

Niðurstøðan hjá granskaranum var, at ættarfrøðiligi hátturin at finna ílegur hevur fyrimunir í mun til aðrar kanningarhættir.

- Føroyar eru serliga væl egnaðar til henda kanningarháttin við atliti til atkomiligar og neyvar ættarupplýsingar og haldgóðar diagnosur, segði hann.

### Útlendskur áhugi

Um verkætlanina annars, segði Pál Weihe, at útlendskar fyritøkur hava áhuga fyri at granska í Føroyum.

Granskarin vísti á, hvussu gongdin í Føroyum hevur verið til tess at skapa lógarkarmar fyri gansking av mannaílegum.

- Tá ið málið um ílegugransking var frammi fyrstu ferð í 1998/1999 kravdu politikarar greiðari lógarkarmar, soleiðis at møgulig virðir kundu koma samfelagnum til góðar - og at trúnaður varð tryggjaður í hesum kanningararbeiði.

Pál Weihe vísti á, at hoyringssvarini, sum komu inn í samband við lógaruppskotið í 2001, vóru atfinningarsom.

Men síðan hevur verið arbeitt við nýggjum uppskoti, og tað var hetta uppskot, sum granskarin kunnaði politikarar og embætisfólk um í Almanna- og Heilsumálaráðnum hendan dagin.

### Tríggjar skráir

Hann vísti á, at sambært uppskotinum verður ílegugranskingin skipað undir einum stovni í heilsuverk-